# BILATORGIÐ

**Føroyski brúktbilamarknaðurin - í Sosialinum hvønn hósdag**

Fyrivarni verður tikið fyri villum



**AUDI 100**
Árg mai.87, Km 163.000.
Kr. 35.000.



**FORD ESCORT 1.8D CLX**
Árg nov.95, Km 187.000.
sýnaður jun-01. Kr. 75.000.



**MAZDA 626 GLX**
Árg sep.92, Km 105.500.
Kr. 80.000.



**RENAULT MEGANE 1.4E**
Árg juli.98, Km 36.500. Kr. 109.000.



**MITSUBISHI CARISMA 1.8GDI**
Árg sep.98, Km 31.500.
Kr. 140.000.



**SUZUKI BALENO 1,3 3H**
Árg mai.96, Km 110.500.
sýnaður mars-01. Kr. 55.000.



**CITROEN ZX 1,9D 5H**
Árg jun.96, Km 89.000. Kr. 84.000.



**CITROËN ZX 1.4I IMAGE 5/H**
Árg mar.96, Km 83.500. Kr. 70.000.



**TOYOTA CARINAE 1.8XLI 5H**
Árg mai.96, Km 38.000. sýnaður
mars-01. Kr. 120.000.



**TOYOTA HI-ACE 2,4D**
Árg jun.99, Km 14.500. Kr.
178.000.



**MITSUBISHI LANCER 1.5 EXE**
Árg jun.92, Km 118.000. Kr.
65.000.



**CITROEN ZX 1,9D 5H**
Árg jun.96, Km 114.500.
sýnaður feb.-01. Kr. 84.000.



**KIA SPORTAGE 2.0I**
Árg okt. 97, Km 42.500.
Kr. 100.000.



**MAZDA 323 1.3 4/H**
Árg 01/04/00, Km 18.000.
Kr. 119.900.



**OPEL ASTRA 1,6**
`Árg des.95, Km 100.500.
sýnaður jul-01. Kr. 75.000.



**CITROEN ZX 1,9D WEEK.**
Árg mar.96, Km 42.000. Kr. 80.000.



**MITSUBISHI COLT 1.6 GLX 3/H**
Árg mai.97, Km 84.500.
Kr. 105.000.



**SPRINTER 312D**
Árg nov.95, Km 122.500.
Kr. 130.000.



**CITROEN ZX 1,4I**
Árg aug.95, Km 103.000.
Kr. 70.000.



**MITSUBISHI GALANT 2,0GTI**
Árg mai.89, Km 170.000. Má
roynast?. Kr. 75.000.



**HONDA CIVIC 1.4I 4H**
Árg des. 95, Km 118.500.
sýnaður jun-01. Kr. 105.000.



**NISSAN PRIMERA 2.0 SLX 4/H**
Árg aug.97, Km 25.000.
Kr. 139.000.

CITROËN Mercedes-Benz MITSUBISHI
Ivan Johansen Bilar
Tel 313666 • www.ivan.fo •e-mail: ivan@ivan.fo



**NISSAN PATROL 4.2 DIESEL**
Árg 1989, Km 245.000. Styttra modellið. Hevur setur aftan, skrásettur sum persónbilur. Er nýsýnaður og hevur m.a. júst skift forhjólslegur. Kr. 85.000.
*216409*



**FORD ESCORT 1.4**
Árg 1987, Km 133.000. Bilurin hevur sóltak, og er sýnaður í januar. Kr. 15.000.



**PEUGEOT 406**
2.1 Turbo Diesel * 118 Hk * Árg. 11-97, Km 105000 (tó mest landavegskoyring), 17" AEZ Simaz sportfelgur, 225/45, Tokulygtir, Eygnaskuggar, Lakeraði spegl og listar, Bak-spoiler, Senkaður aftan & framman (45mm), Sporvíkkarar aftan (25mm), Pioneer CD-avspælari, 180W JBL hátalarar, Bert ein eigari og er sera væl viðfarin.Verður seldur vegnað keyp av nýggjum bilið.
Prísuppskot: kr. 150.000,-
*Tel: 215500 - Rúni*




# ítróttur

Nr. 131 • hósdagur • 12. juli 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

**Í blaðnum í morgin verður frásøgn frá dystinum VB–Slavia Mozyr**

# Asbjørn vann fyrsta gullmerkið



*Asbjørn Hansen gjørdist fyrsti føroyski gullvinnarin, og her stendur hann ovast á sigursskammilinum, meðan tjóðsangurin verður spældur*

**Svimjarin, Asbjørn Hansen, var fyrsti føroyingur at vinna gull á Isle of Man, tá hann vann gull á 50 metra teininum í bringusvimjing**

SVIMJING
*Jákup Mørk/Álvur Haraldsen – Isle of Man*

Klokkan tveir minuttir í átta týskvøldið, varð Merkið vundið á stong í svimjihøllini á Isle of Man, og var hetta fyrsta ferðin síðani setanina, at so var. Asbjørn Hansen var tá trinin upp á pallin, har hann við Merkinum hangandi á herðunum kundi síggja annað Merkið í høllini verða vundið á stong, meðan føroyski tjóðsangurin streymaði úr hátalarunum.

## Hørð kapping

Orsøkin til hetta var sjálvandi tann, at Asbjørn júst hevði vunnið gull í 50 metra bringusvimjing.

Vónirnar undan kappingini vóru eisini til eitt gullmerki. Í innleiðandi bólkunum hevði Asbjørn sett persónligt met við at svimja teinin í 30,06 sekundum, og harumframt var hetta eisini nóg mikið til, at hann byrjaði kappingina á geil fýra sum skjótasti svimjarin.

Kappingin frá mótstøðumonnunum tóktist tó at vera sera hørð. Báðu megin Asbjørn vórðu svimjarar av Isle of Man, og einki var at ivast í, at hesir fóru at fáa hollan stuðul frá heimaáskoðarunum, ið sum vera man høvdu ovurstórar vónir til sínar svimjarar.

## Vendingin avgerandi

Spenningurin var ovurstórur millum føroysku svimjararnar og áskoðarararnar, tá dómarin gjørdi seg til at senda svimjararnar í vatnið.

Starturin hjá Asbjørni var ikki serliga góður, men hann misti tó á ongan hátt takið á mótstøðumonnunum. Vendingin á 25 metrum var avbera goð, og líkt var til, at svimjararnir nú vóru púra javnir, tá seinna longdin skuldi takast. Her eydnaðist okkara manni at vinna seg avgerandi fram um hinar, og hóast tíðin ikki varð heilt so góð, sum hon var um morgunin, so var hetta nóg mikið til at tryggja gullmerkið. Tíðin hjá Asbjørni var 30,16 sekund, meðan næsti maðurin á málið hevði 30,25 sekund.

Nóg mikið var tað so undir øllum umstøðum til at tryggjað Føroyum fyrsta gullmerkið á Oyggjaleikunum í ár.

# Var ov spentur



**Asbjørn helt sjálvur, at hann hevði verið ov spentur undan finaluni, sum tó kortini endaði við gulli**

SVIMJING
*Jákup Mørk/Álvur Haraldsen – Isle og Man*

Beint eftir at Asbjørn var komin úr hylinum, spurdu vit hann, hvussu tað kendist, nú hann sum fyrsti føroyingurin hevði vunnið gullmerki á hesum Oyggjaleikunum.

- Tað plagar jú at vera í svimjing, at fyrsta heiðursmerki kemur, og sjálvandi er tað ein góð kensla.

Spurdur, um hann veruliga fór at trúgva upp á møguleikan, tá hann setti persónligt met um morgunin, segði Asbjørn, at hann vónaði tað besta.

- Hasin, sum var á geil fimm, hevur havt tíðir heilt niður á 30 sekundum, so eg visti, at tað fór at gerast torført.

- Eg var kanska eisini eitt sindur ov spentur í finaluni, og gjørdi eisini eitt mistak í startinum. Vendingin var tó góð, og nú eg havi vunnið, so leggi eg ikki í, at okkurt mistak varð framt á vegnum, segði ein ovurfegin Asbjørn, áðrenn hann fór yvir til rópandi liðfelagarnar.

# Lærir av mistøkunum

**Hóast glaður, so tóktist landsliðsvenjarin ikki vera lopin upp frá í ovfarakæti**

SVIMJING
*Jákup Mørk/Álvur Haraldsen – Isle of Man*



Beint eftir at landsliðsvenjarin, Petur Heðin av Fløttu, hevði sagt tillukku við fyrsta gulldreingin hjá sær, sóust teir báðir tosað saman um, hvørji mistøku vórðu gjørd undir svimjingini, og hvat møguliga kundi betrast.

Vit spurdu Petur Heðin, um tað nú var vanligt, soleiðis at kritisera beint eftir ein svaraði hann nakað soleiðis:

- Mann lærir altíð av at gera feilir, so tað verður altíð tikið fram. Eisini hóast talan er um eina gleðisstund. Tað verður so sjálvandi gloymt eina løtu, men so taka vit aftur saman um seinni í kvøld, segði ein landsliðsvenjari, sum hóast alt var sera fegin um gullið.